# Fyri barnsins besta

Námsfrøði er treyt fyri góðum dagstovnum

DAGSTOVNARÁÐIÐ

**Fyri barnsins besta** · **Útgivið:** Dagstovnaráðið © 2023 · **Vatnlitsmyndir:** Ivonna A. S. Johansen · **Sniðgivið:** VIRKA

# Samandráttur

Í fyrsta lagi verður mælt til, at Barna- og útbúgvingar-málaráðið saman við kommununum tekur stig til, at ein heildarætlan verður gjørd fyri dagstovnaøkið. Heildarætlanin eigur at vísa á, hvussu neyðug stig kunnu takast at tryggja, at viðurskifti sum útbúgvin starvsfólk, neyðug starvsfólkaorka og hølisviðurskifti liva upp til lógarásett krøv.

Annar partur av tilmælinum snýr seg um, hvussu fleiri fáast at útbúgva seg til námsfrøðing, so námsfrøðin verður tryggjað børnunum á dagstovnaøkinum. Tað snýr seg um at skapa áhuga hjá fólki til at útbúgva seg til námsfrøðingar. Uppskot er haraftrat um at gera fyrireikingarflokk til námsfrøðingalesandi, sum ikki hava verið í skúlaskipanini í mong ár, og at skipa námsfrøðihjálparaútbúgvingina, soleiðis at hon gevur atgongd til víðari lesnað á námsfrøðingaútbúgvingina. Góðskriving av førleikum, avriksflutningur og fjarlestur eru eisini møguleikar, sum dentur eigur at verða lagdur á at menna.

Fyri at halda fast í starvsfólki er neyðugt at skapa arbeiðsumstøður, sum gera tað ynskiligt hjá starvsfólkum at verða verandi í starvinum. Her eru ymisk fokuspunkt, sum t.d. betri tíð til námsfrøðiligt arbeiði, til tilrættisleggjan og eftirmeting, betri umstøður til fulltíðarstarv, kappingarføra løn og betri umstøður til eftirútbúgving.

At enda er uppskot um at seta á stovn eina menningareind, sum skal tryggja og standa fyri einari felags menning av økinum. Ein menningareind kann menna dagstovnanámsfrøðina, sum í síðsta enda kann fáa fleiri fólk til økið og fáa tey, sum longu eru har, at støðast.

# Innihald


| | |
|---|---|
| Um tilmælið | 5 |
| Yvirlit yvir tilmæli | 6 |
| Inngangur | 7 |
| A Børn hava rætt til | 12 |
| B Útbúgving | 15 |
| C Nøktandi arbeiðsumstøður | 18 |
| D Menningareind fyri dagstovnar | 20 |
| Keldulisti | 22 |
| Fylgiskjal 1 | 23 |
| Fylgiskjal 2 | 24 |

# Um tilmælið

Sambært § 2 í dagstovnalógini kann landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum áleggja kommununum í felag at seta á stovn eitt dagstovnaráð, sum skal veita kommunum og landi ráðgeving og vegleiðing í námsfrøðiligum spurningum. Dagstovnaráðið kann eisini sjálvt taka mál upp, og tað ger ráðið við hesum tilmæli, av tí at trotið á dagstovnanámsfrøðingum hevur staðið við í mong ár, sum tí væntandi merkir dagstovnanámsfrøðina og trivnaðin og menningina hjá børnunum.

Síðani september 2021 hevur Dagstovnaráðið arbeitt við hesum tilmæli á 15 fundum og einum arbeiðsdegi. Arbeiðið hevur verið skipað undir yvirskipaðu umrøðuevnunum: Umstøður, útbúgving og onnur stig. Undirliggjandi evni hava verið viðgjørd og umrødd, og at enda vórðu tey tilmæli vald út, ið vóru mett at hava størst týdning og kundu gera mestan mun.

**Tórshavn á Pálsmessu, 25. januar 2023**

**Hildur Patursson,** forkvinna,
Uttanríkis- og mentamálaráðið
*(nú: Barna- og útbúgvingarmálaráðið)*

**Annika Antoniussen,** Fróðskaparsetur Føroya

**Ivonna A. S. Johansen,** Fróðskaparsetur Føroya

**Edda Hjartvarsdóttir,** Føroya Pedagogfelag

**Julianna Næs,** Føroya Pedagogfelag

**Fróði Jacobsen,** Javnstøðunevndin

**Eyðun Christiansen,** Kommunufelagið

**Óli Rubeksen,** Kommunufelagið

Skrivari hjá Dagstovnaráðnum er
**Brynhild Høgnadóttir,** Kommunufelagið

# Yvirlit yvir tilmæli

### A. Børn hava rætt til

1. Heildarætlan fyri dagstovnaøkið
2. Hóskandi starvsfólkaorka og støðd á barnabólkum
3. Krøv til innandura og uttandura viðurskifti

### B. Útbúgving

4. Áhugi fyri námsfrøðingalestrinum
5. Fyrireikingarskeið til námsfrøðingalestur
6. Námsfrøðihjálparaútbúgving
7. Tveir flokkar á námsfrøðingaútbúgvingini
8. Eftirútbúgving og skeið til starvsfólk á dagstovnaøkinum
9. Karmar til menningar- og trivnaðarátøk
10. Góðskriving av førleikum og avriksflutningur

### C. Nøktandi arbeiðsumstøður

11. Tíð til námsfrøðiligu uppgávurnar
12. Dagføring av lønini so samsvar er millum útbúgving, ábyrgd og løn
13. Dagstovnanámsfrøðingar og hjálparfólk arbeiða fulla tíð
14. Vegleiðing av nýútbúnum námsfrøðingum og hjálparfólkum

### D. Menningareind fyri dagstovnar

15. Menningareind fyri dagstovnar í Føroyum

# Inngangur

Høvuðsboðskapurin í dagstovnalógini og námsfrøðiligu stevnumiðunum er ein heildaráskoðan á børn, har børn við umsorgan skulu fáa nógvar møguleikar at menna og menta seg. Orðingarnar í námsfrøðiligu stevnumiðunum eru í samsvari við barnarættarsáttmálanum hjá ST, har dentur er lagdur á, at børn skulu hava ávirkan á egið lív. Hetta er teirra rættur.

Námsfrøðiligur førleiki og kunnleiki hjá starvsfólkunum er týdningarmesti tátturin at skapa innihald og trivnað fyri børnini í dagstovninum og fyri at røkka endamálinum, sum er ásett í dagstovnalógini.

Dagstovnalógin ásetir í § 8, at í minsta lagi 2/3 av starvsfólkunum skulu vera námsfrøðingar. Seinnu árini hevur gingið øvuta vegin við partinum av námsfrøðingum.

Ein uppgerð hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum fyri 2020 vísir, at av samanlagt 922 námsfrøðiligum ársverkum eru einans 440 ársverk hjá námsfrøðingum, meðan 482 eru ársverk hjá hjálparfólki. Námsfrøðingaparturin er sostatt umleið 48 % fyri landið samanlagt. Tað er rættiliga ymiskt kring landið, hvussu stórur námsfrøðingaparturin er. Í allarflestu førum er parturin av námsfrøðingum minni enn 2/3. (Kommunufelagið, 2021, s. 42).

Dagstovnaráðið metir, at besta dagstovnalívið fáa børnini, um 2/3 ella allarhelst øll starvsfólk, sum eru um børnini, eru námsfrøðingar. Men við einfaldari høvuðrokning er greitt, at hetta letur seg ikki gera komandi árini. Veruleikin er, at starvsfólkahópurin á dagstovnaøkinum er samansettur av námsfrøðingum, hjálparfólkum og øðrum fakbólkum við.

Seinastu árini hevur verið greitt, at starvsfólkatrotið summa staðni hevur verið so stórt, at neyðugt hevur verið at lata dagstovnar aftur partar av degnum.

Ein avbjóðing er, at ov nógvir námsfrøðingar og hjálparfólk steðga stutt í starvi. Stóra útskiftingin av starvsfólki skapar órógv í gerandisdegnum, bæði hjá børnum og starvsfólkum.

Trupulleikin er samansettur, og her er eingin einføld loysn. Her mugu stig takast á fleiri mótum fyri at fáa til vega fleiri dagstovnanámsfrøðingar og hjálparfólk og at fáa tey at støðast. Tað hevur skund.

Fyri komandi ættarlið er umráðandi, at politikarar taka neyðug stig, fyri at dagstovnar kunnu menna og styrkja tað barnaumhvørvið, ið dagstovnalógin, námsfrøðiligu stevnumiðini og barnarættindasáttmálin áseta.

Í ólavsøkurøðuni 2022 segði táverandi løgmaður um dagstovnaøkið:

*Neyðugt er við átøkum til at minka um starvsfólkatrotið á dagstovnaøkinum. Til dømis verður námsfrøðiútbúgving umskipað í tvær leiðir. Farið verður undir at útbúgva námsfrøðingar beinleiðis til dagstovnaøkið. Á heysti 2023 verða tveir flokkar tiknir inn á námsfrøðiútbúgvingina á Setrinum.*

Eisini nýggja samgongan, sum varð skipað beint fyri jól í 2022, hevur sett sær mál á dagstovnaøkinum. Í samgonguskjalinum millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn stendur millum annað soleiðis:

*Meiri tíð skal vera til námsfrøðiligt virksemi, trivnaðarskapan og málsliga menning millum børn. Dagstovnalógin skal dagførast saman við kommununum. Eykaflokkur av námsfrøðingum verður tikin upp. Merittútbúgvingar og ískoytisskeið skulu skipast fyri at geva møguleika fyri víðari útbúgving á m.a. námsfrøði- og heilsuútbúgvingum.*

Hetta eru góð mál, sum Dagstovnaráðið tekur undir við, men fleiri átøk eru neyðug fyri at steðga trotinum á dagstovnanámsfrøðingum. Og fleiri átøk eru neyðug fyri at tryggja børnunum rætt til eitt gott dagstovnalív.

Endamálið við hesum tilmæli er bæði at vísa á, hvørji ítøkilig stig kunnu verða tikin til tess at steðga námsfrøðinga- og starvsfólkatrotinum á dagstovnaøkinum og at vísa á umstøður, sum eru við til at tryggja børnunum eitt gott dagstovnalív.

Dagstovnaráðið heitir á politisku skipanina at taka ábyrgd av álvarsomu støðuni, og at stig verða tikin til eina yvirskipaða heildarætlan at fáa til vega dagstovnanámsfrøðingar og hjálparfólk. Við tilmælunum í hesum riti bjóða vit tykkum sum vara av dagstovnaøkinum 15 ítøkilig tilmæli, sum Dagstovnaráðið metir neyðug.

## Góðir dagstovnar gera mun

Dagstovnar eru námsfrøðiligir stovnar, sum fyrst av øllum eru til fyri børnini. Dagstovnar skulu hava eina dygd, bæði námsfrøðiliga, mentanarliga, umhvørvisliga og sosialt, sum til eina og hvørja tíð er í samsvari við tann kunnleika og tað innlit, sum er um barndóm, barnaáskoðan, læruáskoðan og serligu rættindi barnsins (UMMR, 2016).

Eins og í okkara grannalondum er meginparturin av børnunum á dagstovni. Áhugi hevur verið fyri, hvørja ávirkan tað hevur á barnsins menning og mentan at vera á dagstovni. Serliga eru tað tvær stórar langtíðargranskingarverkætlanir, sum ofta verður víst á, tá talan er um, hvørja ávirkan dagstovnar hava á lívið hjá børnum – bæði her og nú og seinni á lívsleiðini.

### High/Scope Perry Preschool Project

Onnur av teimum dyggu granskingarverkætlanunum er High/Scope Perry Preschool Project (Schweinhart, L.J. et al, 2005), sum byrjaði miðskeiðis í 60-árunum. Børn, sum vóru við í kanningini, vóru frá tvey til fimm ár. Rannsóknin er enn virkin, og hon vísir millum annað á, at børn hava fyrimun av at vera á dagstovnum, at dygdin á dagstovnunum hevur avgerandi týdning, og at tess fleiri ár tey ganga á dygdargóðum dagstovnum, tess betur menna tey seg. Granskingin vísir eisini á, at børn, sum hava verið á dagstovnum, har fakliga støðið er høgt, hava framhaldandi gagn av tí øll skúlaárini, og at tey klára seg munandi betur. Verkætlanin vísir somuleiðis á, at fleiri fingu sær útbúgving, og at tað var minni kriminalitetur og minni arbeiðsloysi millum tey, ið høvdu gingið á dygdargóðum dagstovnum, samanborið við børn, sum ikki høvdu verið á dygdargóðum dagstovnum. Sum heild høvdu fleiri av teimum minni tørv á serundirvísing.

### EPPE/EPPSE-kaningin

Hin stóra langtíðarkanningin er bretska EPPE/EPPSE-kaningin (Taggart, B., et al, 2015), sum fór fram í 1997-2014. Kanningin er serstøk, tí hon kannaði børnini, frá tí tey vóru 2 til 16 ára gomul børn, sum vóru á dagstovni, og børn, sum vóru heima. Kanningin staðfesti, at børn, sum vóru á góðum dagstovnum, vóru væl betri fyri á øllum økjum, enn tey, sum ikki fingu henda møguleikan.

Millum annað vóru tey betur fyri málsliga og í talfatan, høvdu betri sosialar førleikar, góð samstarvsevni, betri bindindi, megnaðu betri at regulera kenslur, og fleiri av teimum fóru undir útbúgving seinni. Ein av niðurstøðunum í EPPSE-kanningini var, eins og í High/Scope Perry Preschool Projekt, at børn, sum høvdu verið á dygdargóðum dagstovnum, kláraðu seg eisini munandi betur í skúlanum, hóast dygdin í skúlanum ikki var av tí besta. Eisini høvdu færri tørv á serundirvísing.

Báðar hesar stóru langtíðarkanningarnar leggja stóran dent á týdningin av væl útbúnum starvsfólkum í dagstovnanámsfrøði, vælskipaðum virksemi, góðum námsfrøðiligum stevnumiðum og góðum samspæli millum børnini og millum starvsfólk og børn.

**Heckman og aðrar kanningar**

Búskaparfrøðingurin og nobelprísvinnarin, James Heckman, hevur samstarvað við High Scope Perry Preschool Projekt og samskift við EPPSE-verkætlanina. Heckman vísir á, at tá eitt samfelag velur at gera íløgur í at skapa góðar barnagarðar av høgari góðsku, er tað nakað, sum loysir seg best fyri tann einstaka og fyri samfelagið í sínari heild, millum annað við búskaparligari framgongd. Niðurstøðan er greið: Tað loysir seg at leggja mestu orkuna tey fyrstu árini hjá børnunum, tí tað hevur langtíðar ávirkan á teirra læru- og menningarmøguleikar, og tey megna sum heild lívið betri, eisini seinni í lívinum.

Niðanfyri er kenda myndin frá Heckman um búskaparliga týdningin, sum dygdargóðir dagstovnar hava, og at tað loysir seg í stóran mun at leggja mesta orku í tey fyrstu árini (Heckman).

## Economic impact of investing in early childhood learning




Kelda: Heckman

Nógvar norrønar kanningar eru um dygd á dagstovnum, og tær benda á tað sama, at tað loysir seg við dygdargóðum dagstovnum. Eitt eyðkenni fyri norrøna gransking er, at tað eru kvalitativar kanningar. Fleiri av hesum kanningum eru savnaðar í rapportini hjá Sommersel et. al. (2013), eins og gransking er at á finna á www.nb-ecec.org. Á hesari heimasíðuni er eitt stórt savn av granskingarúrslitum um týdningin av góðum dagstovnum; harumframt á www.nordiskbarnehageforskning.no. Serliga áhugaverd er gransking av týdninginum av góðum dagstovnum fyri tey allaryngstu børnini, t.d. hjá G. Løkken (1996) og hjá I. Engdah (2011).

Samanumtikið eru niðurstøðurnar í teimum stóru langtíðarkanningunum greiðar: Dygdin í vøggustovum og barnagørðum hevur beinleiðis týdning fyri, um børnini fáa eitt gott og mennandi lív her og nú, og eisini fyri um tey megna at fóta sær seinni í lívinum. Høvuðseyðkenni fyri dygdargóðar dagstovnar var, at tær høvdu væl útbúgvin starvsfólk í dagstovnanámsfrøði. Námsfrøðingar, sum reflekteraðu, vóru forvitnir og dugdu at vekja forvitni í børnunum (Sommersel, 2013).

Umframt at væl kvalifiseraðir dagstovnanámsfrøðingar hava týdning fyri dygdina á dagstovnunum, so hevur bygnaðarliga dygdin eisini týdning. Bygnaðarliga dygdin er millum annað námsfrøðilig normering, støðd á barnabólkum, heildarmanning, innandura og uttandura økið, skipan av námsfrøðiliga arbeiðinum og arbeiðsumstøður (Sommersel, 2013).

## Hvat er dygd í dagstovnum?

Innan gransking á dagstovnaøkinum eru fleiri fatanir av, hvat dygd er, sum til samans bjóðar eina samanhangandi heildaráskoðan á, hvat hevur týdning fyri dygd á dagstovnum. Yvirskipað eru tríggir týðandi tættir:

- Bygnaðarlig dygd (strukturel kvalitet)
- Prosessdygd (proceskvalitet)
- Úrslitsdygd (resultatkvalitet)

Nøktandi góðska fevnir sostatt um hesar tríggjar tættir.

Bygnaðarliga dygdin eru teir karmar og viðurskifti, sum námsfrøðiliga siðvenjan virkar innanfyri. Hon er ávirkað av fíggjarviðurskiftum, samskipan, leiðslu o.s.fr. á dagstovninum, til dømis fysiskir karmar, normering og støddin á barnabólkum. Hesi viðurskiftini kunnu í ávísan mun stýrast.

Prosessdygdin fevnir um dygdina í námsfrøðiliga arbeiðinum. Hon finst millum annað í sambandinum millum børn og starvsfólk og í stimbranini av málinum hjá børnum í hesum læruumhvørvi. Prosessdygdin fevnir eisini um dygdina av námsfrøðiligu førleikunum viðvíkjandi samvirkan við børn í sambandi við spæl og læring.

Bygnaðarlig dygd og prosessdygd eru í stóran mun fortreytir fyri úrslitsdygd.

Úrslitsdygd snýr seg um, hvat børnini fáa burturúr at ganga á dagstovni, bæði her og nú og sum frá líður. Tað snýr seg um trivnað, læring og menning – kognitivt, sosialt og motoriskt (Danmarks Evalueringsinstitut, 2017, nb-ecec.org, Sommersel, 2013).

Her er ikki talan um tríggjar einstakar tættir, hinvegin eru teir í stóran mun samantvinnaðir og ávirka hvønn annan:

## Tríggir tættir – 11 evni




Normering og bólkastødd og -skipan

Fysiskir karmar

Útbúgving, eftirútbúgving og starvsfólkastøðufesti

Samvirkan millum børn og starvsfólk

Spæl

Rutinumerktar støður og virksemi

Leiðsla av dagstovni

Foreldrasamstarv

Sosialir førleikar

Fakliga kognitivir førleikar

Skúlabúgvin

Kelda: Danmarks Evalueringsinstitut (2017), s. 5

Omanfyristandandi til samans 11 evnini eru í granskingini eyðmerkt sum avgerandi fyri dygdina í dagstovnum. Myndin skal ikki síggjast sum statisk, men heldur yvirskipað, har partarnir í henni eru dynamiskir og ávirka og spæla inn í hvønn annan. Myndin gevur eina góða ábending um, hvat eigur at verða havt í huga, tá tosað verður um dygd á dagstovnum.

### Tilmæli

Tilmælini í hesum riti eru býtt í hesi fýra høvuðsevnini:

A Børn hava rætt til

B Útbúgving

C Nøktandi arbeiðsumstøður

D Menningareind fyri dagstovnar

Í hvørjum parti verður verandi støða lýst í stuttum, síðani koma tilhoyrandi tilmæli.

A

# Børn hava rætt til

Børn hava rætt til at vera í einum umhvørvi, sum byggir á mannarættindi og fólkaræði. Hetta samsvarandi tí, sum námsfrøðiligu stevnumiðini, dagstovnalógin og barnarættindasáttmálin áseta.

Meginparturin av føroysku børnunum eru fleiri vaknar tímar í dagstovni enn heima hjá foreldrunum. Dagstovnar hava ein týðandi leiklut í uppalingini hjá børnum í dag. Umráðandi er, at dagstovnar hava námsfrøðiliga fakligheit og góðsku og bjóða børnunum mentanar- og menningarmøguleikar, har børn hava ein virknan leiklut at skapa seg sjálv. Tess betri námsfrøðiliga útbúgvin starvsfólk eru, tess betri dygd í dagstovnunum. Tí er ynskiligt, at øll starvsfólk hava nomið sær fakliga vitan innan námsfrøðiligt arbeiði, og tí megna at skapa ein innihaldsríkan gerandisdag fyri børnini við støði í teirra rættindum.

Í løtuni verður ásetingin um, at 2/3 av starvsfólki á dagstovnum eru námsfrøðingar, ikki útint. Ongar dagførdar ásetingar eru um tal av børnum fyri hvønn námsfrøðing, stødd av barnabólkum og námsfrøðilig krøv til innandura og uttandura viðurskifti.

## 01 Heildarætlan fyri dagstovnaøkið

Fyri at loysa trupulleikan við troti á dagstovnanámsfrøðingum og hjálparfólkum er neyðugt at seta inn á fleiri økjum og fyri at røkka á mál, mugu allir partar taka ábyrgd av einari loysn, bæði her og nú og sum frá líður. Tí er fyrsta stigið at gera eina heildarætlan fyri dagstovnaøkið, har tilmælini verða ráðløgd, raðfest og tíðarásett.

Í dagstovnalógini § 3, stk. 3 er áseting um, at landsstýrismaðurin eigur at áseta nærri reglur um námsfrøðilig stevnumið, starvsfólkasamanseting og virksemi á dagstovnum og dagrøktum (Dagstovnalógin, 2000).

**Mælt verður til,** at avvarðandi myndugleikar við heimild í § 3, stk. 3 í dagstovnalógini gera heildarætlan til tess at tryggja góðar karmar um virksemið hjá dagstovnum.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið og kommunurnar.

## 02 Hóskandi starvsfólkaorka og støðd á barnabólkum

At seta sær fyri at útinna § 8 í dagstovnalógini at í minsta lagi 2/3 av starvsfólkunum skulu vera námsfrøðingar, letur seg ikki gera við eitt. Hetta eigur tó at vera eitt ítøkiligt mál hjá landi og kommunum, sum tey eiga at fara undir at skapa karmar til samsvarandi tilmælunum í hesum riti.

Sambært viðmerkingunum til § 3, pkt. 2 í lógaruppskotinum til løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt var ætlanin at áseta, hvussu lutfallið skal vera millum børn og starvsfólk:

"Eins og í øðrum londum er ætlanin at áseta, hvussu nógv børn skulu vera fyri hvørt starvsfólk, og hvussu samansetingin av hesum starvsfólkum skal vera. Hetta fyri at røkka endamálinum í lógini við at menna og menta børn." (logting.fo, 1999).

Men enn er eingin áseting gjørd.

Hugtakið, normering, er fjølbroytt og sett saman av nógvum smálutum, og neyvan ber til at yvirføra eina normering frá einum stovni, eini kommuna ella einum landi til annað. Neyðugt er í hvørjum einstøkum føri at kenna smálutirnir í hugtakinum, eitt nú: Hvussu leingi er stovnurin opin? Hvørji starvsfólk er talan um? Og so framvegis.

Norðurlendsk og altjóða gransking vísa á, at neyðugt er við nóg mikið av dagstovnanámsfrøðingum, og at barnabólkarnir eiga ikki at vera ov stórir, fyri at børnini fáa sum mesta gleði av sínum dagstovnalívi. Støddin á barnabólkum hevur ávirkan á, hvussu børnini hava tað, og hvussu tey læra og mennast (NICHD, 2002; Sheridan, Williams et al. 2014).

Viðvíkjandi teimum yngstu børnunum hevur amerikanski granskingarstovnurin NICHD (2002) kannað normeringar hjá vøggustovubørnunum og mælir til, at ikki eru meira enn 3 til 4 børn til hvønn námsfrøðing, tá ið børnini eru undir 2 ár, og barnabólkarnir eiga at vera smáir: 6 til 8 børn í hvørjum bólki. Og at minni bólkastøddir geva betri dygd og trivnað, umframt at sambandið millum børn og sambandið millum námsfrøðingar og børn verður munandi betri. Víst verður eisini á, at góð normering hevur ávirkan á fatanina hjá námsfrøðingum av teirra arbeiði, og teir uppliva lága normering sum meira útlúgvandi. Somu niðurstøðu kemur EPPSE-granskingin (Taggart et al, 2015) til, nevniliga at høg normering hevur góða ávirkan á menningina hjá børnum, bæði her og nú og eisini seinni í lívinum.

**Mælt verður til** at seta ein arbeiðsbólk at lýsa arbeiðsuppgávurnar hjá dagstovnanámsfrøðingum. Hetta fyri at tryggja børnunum tíð við námsfrøðiligum innihaldi.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið og kommunurnar.

**03**

## Krøv til innandura og uttandura viðurskifti

Nóg gott pláss er avgerandi fyri dygdina í námsfrøðiliga arbeiðinum. Nógv er kannað um týdningin av góðum plássi á dagstovnum bæði innan- og uttandura (Hagen, 2015).

Galdandi krøv til hølisviðurskifti á dagstovnum finnast í vegleiðing frá Arbeiðseftirlitinum á www.arb.fo (Arbeiðseftirlitið, 2004).

Vegleiðingin eigur at verða endurskoðað, og ein dagførd vegleiðing gjørd, sum eisini tekur námsfrøðilig atlit, har lagt verður upp fyri teimum námsfrøðiligu uppgávum, sum dagstovnar eiga at røkja, so børnini fáa sum best burtur úr dagstovnatíðini.

Góðar umstøður hava ávirkan á menningar- og læringarmøguleikarnar hjá børnum, vísa Williams et al. (2019) á. Neyðugt er at børnini hava gott pláss til spæl, skapandi virksemi og hugsavnan. Harumframt at pláss skal vera til at taka sær av børnum við serligum tørvi, sum hava tørv á at fara burtur frá, tí tey ikki megna at vera í einum størri barnabólki allan dagin, og fyri børnum, sum hava stór hjálpitól o.l.

**Mælt verður til** at seta ein arbeiðsbólk at gera uppskot til dagføring av verandi krøvum hjá Arbeiðseftirlitinum og at gera eina vegleiðing, sum eisini tekur støði í námsfrøði, til tess at tryggja eitt gott innan- og uttandura barnaumhvørvi.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið, kommunurnar og Arbeiðseftirlitið.

# B
# Útbúgving

Tað hevur bráðfeingis skund at fáa til vega fleiri dagstovnanámsfrøðingar.

Eins og víst omanfyri í partinum, Góðir dagstovnar gera mun, hava væl útbúgvin starvsfólk og væl skipað virksemi alstóran týdning fyri dygdina í dagstovnum.

Útbúgving og støðug eftirútbúgving hjá starvsfólkum eru neyðug fyri at skapa góðar dagstovnar, sum geva børnum góðar menningar- og mentanar-møguleikar, og sum heild eitt meira stimbrandi umhvørvi.

Til tess at fáa fleiri at útbúgva seg til námsfrøðingar í dagstovnanámsfrøði er neyðugt at víðka um upptøkumøguleikarnar til útbúgvingina og at eggja fleiri til at taka útbúgving sum dagstovnanámsfrøðingar og námsfrøðihjálparar.

04
### Áhugi fyri námsfrøðingalestrinum

Umráðandi er, at til ber at skapa góðar frásagnir um dagstovnaøkið og tað at virka sum dagstovnanámsfrøðingur.

**Mælt verður til** at skipa kunningartiltøk um námsfrøðingaútbúgvingina og -starvið við átøkum um útbúgving og yrki á dagstovnum, miðnámsskúlum og í fólkaskúlum.

Tær góðu frásagnirnar kunnu skapast við at kunna meira um námsfrøðingaútbúgvingina á ymiskum pallum:

- **Á dagstovnum** ber til at vekja áhuga fyri lestrinum til námsfrøðing.  Hetta kann gerast við ymiskum árligum átøkum og kunningarfundum, har hjálparfólk verða kveikt at umhugsa námsfrøðingaútbúgvingina.

  **Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Pedagogfelagið, kommunurnar og Fróðskaparsetrið.

- **Á framhaldsdeildum** í fólkaskúlanum eigur at verða skipað fyri árligum kunningartiltøkum um námsfrøðingaútbúgvingina.

  **Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið og fólkaskúlin í samstarvi.

- **Á miðnámsskúlum** kann verða kunnað árliga um útbúgvingarnar á Setrinum, og her ber til at gera meira umfatandi og ítøkilig kunningarátøk um námsfrøðingaútbúgvingina. Harumframt kundu talgild átøk verið ein møguleiki at rokkið miðnámsskúlanæmingum.

  **Ábyrgd:** Lestrarvegleiðarin á Námsvísindadeildini og lestarvegleiðing á miðnámsskúlum í samstarvi.

05
### Fyrireikingarskeið til námsfrøðingalestur

Til tey, sum ikki hava verið í skúlaskipanini í mong ár, eigur at verða bjóðað fyrireikingarskeið til tess at fyrireika tann lesandi til at byrja lesturin á námsfrøðingaútbúgvingini. Her verður bæði hugsað um tey, sum koma inn gjøgnum kvotu I og II.

**Mælt verður til** at skipa fyri fyrireikingarskeiði fyri lesandi, sum ikki hava verið í útbúgvingarskipanini í mong ár.

**Ábyrgd:** Fróðskaparsetrið.

06
### Námsfrøðihjálparaútbúgving

Tørvur er á at kunna menna seg fakliga innan námsfrøðiliga økið sum atstøðingur, og hetta ber til á Heilsuskúlanum í Hovi. Har ber til at útbúgva seg til námsfrøðihjálpara, men hetta gevur ikki atgongd til námsfrøðingaútbúgvingina á Fróðskaparsetrinum. Av norðurlendsku námsfrøðingaútbúgvingunum er føroyska námsfrøðingahjálparaútbúgvingin einans førleikagevandi til donsku námsfrøðingaútbúgvingina. Tað er neyðugt, at ein tílík útbúgving er førleikagevandi til námsfrøðingaútbúgvingina í Føroyum.

Sum er sýnist námsfrøðihjálparaútbúgvingin ikki hava drigið nógv lesandi til sín, tí er umráðandi í størri mun at gera vart við útbúgvingina.

**Mælt verður til,** at námsfrøðihjálparaútbúgvingin verður skipað soleiðis at hon verður endurskoðað við atliti til at verða førleikagevandi til føroysku námsfrøðingaútbúgvingina – og at hon er í tráð við føroysku útbúgvingarskipanina í samstarvi við Fróðskaparsetrið. Eisini verður mælt til at taka stig til at eggja fleiri til at taka námsfrøðihjálparaútbúgvingina.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið.

07

### Tveir flokkar á námsfrøðingaútbúgvingini

Eftir ætlan verða tveir flokkar tiknir inn til námsfrøðingalestur komandi lestrarár. Tað er skipað sum tveyflokkaskipan eftir tilmælum frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. Hetta er ein partvís generalistútbúgving við tveimum breytum, ein til sosial- og sernámsfrøði og ein til dagstovnanámsfrøði. Fróðskaparsetrið er búgvið at seta hesa skipanina í gongd við tí endamáli at útbúgva fleiri námsfrøðingar.

**Mælt verður til** at virka fyri at tryggja, at tveir flokkar verða tiknir inn heystið 2023 og frameftir.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Fróðskaparsetrið.

08

### Eftirútbúgving og skeið til starvsfólk á dagstovnaøkinum

Tað hevur týdning, at námsfrøðingar og hjálparfólk kunnu førleikamenna seg, fáa nýggja vitan og kunna fasthalda eini menning, sum skapar motivatión og ágrýtni í námsfrøðiliga arbeiðnum fyri at megna at møta børnunum, har tey eru, út frá menningartilgongdum, sum eru aktuellar.

Eftirútbúgving gevur ikki einans nýggja vitan og nýggjar avbjóðingar, men eisini eitt umhvørvi, har námsfrøðingurin kann møta javnlíkum, skapa sambond og møgulig samstørv, ið kunnu viðvirka til trivnað, og at námsfrøðingar støðast longur í starvinum.

Í síni heild eigur eftirútbúgvingin at stuðla uppundir dagstovnalív og teir fjølbroyttu menningarmøguleikarnar, sum børn eiga at fáa.

**Mælt verður tí til,** at Námsvísindadeildin áhaldandi arbeiðir við at skapa fjølbroytt eftirútbúgvingartilboð í dagstovnanámsfrøði, og at aðrir avvarðandi myndugleikar taka stig til at skapa karmar og fígging av eftirútbúgving og skeiðum til námsfrøðingar og hjálparfólk.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Fróðskaparsetrið og kommunurnar.

09

### Karmar til menningar- og trivnaðarátøk

Neyðugt er at umhugsa tiltøk, sum bæði kunnu økja um áhugan hjá námsfrøðingum og hjálparfólkum at velja arbeiði á dagstovnunum og at verða verandi á dagstovnunum. Námsfrøðiligu stevnumiðini mæla til at gera miðvíst menningararbeiði, sum kann føra til broytingar, nýhugsan og støðugt bøta um námsfrøðiliga arbeiðið. Styttri skeið og námsfrøðilig menningararbeiði kundu økt um áhugan at arbeiða á dagstovnum og hækkað støðið munandi, og eisini gjørt arbeiðið bæði áhugaverdari og stuttligari. Menningararbeiðini kunnu geva øðrum dagstovnum íblástur til nýhugsan.

**Mælt verður til,** at kommunur og land í felag taka stig til at fíggja smærri menningararbeiði á dagstovnum.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið og kommunurnar.

10

### Góðskriving av førleikum og avriksflutningur

Til tey, sum hava aðrar útbúgvingar, eigur at verða gjørd ein skipan til góðskriving av førleikum. Tað vil siga ein skipan, har til ber at fáa antin partar góðskrivaðar ella avriksflutning á námsfrøðingaútbúgvingina. Her eiga nýføroyingar við útlendskum útbúgvingum eisini at verða tiknir við í skipanina. Eisini eigur ein skipan til avriksflutning at verða tikin upp í skipanina.

**Mælt verður til,** at gjørd verður ein skipan til góðskriving av førleikum og avriksflutning.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Fróðskaparsetrið.



C

# Nøktandi arbeiðsumstøður

Tað er ein trupulleiki, at ov fáir námsfrøðingar velja at arbeiða á dagstovnum. Fáir námsfrøðingar og hjálparfólk arbeiða fulla tíð (t. e. 40 tímar um vikuna) á dagstovnum. Ábendingar eru um, at bæði námsfrøðingar og hjálparfólk steðga stutt í starvi. Støðuga skiftið av starvsfólkum hevur stóra ávirkan á námsfrøðiliga innihaldið og menningina hjá børnunum.

Arbeiðstrýstið er stórt, og tað er krevjandi at vera átta tímar dagliga beinleiðis saman við børnum. Undir núverandi umstøðum er nærum eingin tíð sett av til at leggja arbeiði til rættis og til arbeiði, sum liggur uttanfyri barnabólkin.

Lønin hjá námsfrøðingum er lægri samanborið við lønini hjá javnmettum fakbólkum. Lønin kann hava við sær, at námsfrøðingar velja arbeiði á dagstovnum frá. Sostatt stendur námsfrøðingastarv og -útbúgving seg ikki í kappingini við aðrar miðallangar útbúgvingar.

Dagstovnaráðið er greitt um, at viðurskifti viðvíkjandi løn, arbeiðstíðum og arbeiðsviðurskiftum sum heild er ábyrgdarøki hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Men hesi viðurskifti hava stóran týdning fyri trivnaðin hjá starvsfólkunum, og mett verður tí, at neyðugt eisini er at nevna tey í tilmælinum.

11

### Tíð til námsfrøðiligu uppgávurnar

Námsfrøðingarnir hava eina samfelagsskyldu at fylla út karmarnar í dagstovnalógini og námsfrøðiligu stevnumiðunum, og tí er alneyðugt, at tíð verður sett av til at leggja til rættis námsfrøðiliga arbeiðið til námsfrøðiliga "reflektión", tilrættislegging og eftirmeting.

Ikki fyrrenn námsfrøðingar fáa møguleikar at fylla út karmarnar í dagstovnalógini, fáa børnini tað námsfrøðiliga innihaldið, tey hava rætt til.

**Mælt verður til,** at settur verður arbeiðsbólkur at lýsa starvsinnihaldið hjá námsfrøðingum og hjálparfólki fyri at tryggja námsfrøðiligu dygdina.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið og kommunurnar.

12

### Dagføring av lønini so samsvar er millum útbúgving, ábyrgd og løn

Samanborið við lønina hjá javnmettum útbúgvingum, liggur byrjanarlønin hjá námsfrøðingum á umleið sama stigi. Men endalønin hjá námsfrøðingum liggur munandi undir henni hjá eitt nú sjúkrarøktarfrøðingum og lærarum, umframt at eftirlønin er lægri hjá námsfrøðingum. Sí samanbering í fylgiskjali 1. Harumframt hækkar lønin hjá lærarum og sjúkrarøktarfrøðingum munandi skjótari enn hon hjá námsfrøðingum, sum merkir, at lívslønin hjá námsfrøðingum er lutfalsliga lág. Sí samanberingar yvir mánaðarløn við og uttan eftirløn í fylgiskjali 2

Námsfrøðingar eiga at fáa eina løn, sum svarar til sambæriligar útbúgvingar, annars er lítið sannlíkt, at útbúgvingin stendur seg í kappingini.

**Mælt verður til,** at Barna- og útbúgvingarmálaráðið og kommunurnar samskifta um, hvussu lønar- og arbeiðsviðurskiftini hjá námsfrøðingum fáast at svara til sambæriligar útbúgvingar.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið og kommunurnar.

13

### Dagstovnanámsfrøðingar og hjálparfólk arbeiða fulla tíð

Børn hava rætt til ein gerandisdag við reglusemi uttan ov nógv óneyðug skift av starvsfólki. Orka eigur at verða løgd í at skipa gerandisdagin soleiðis, at reglan er, at starvsfólk á dagstovnum arbeiða fulla tíð, ella at tey í minsta lagi fáa møguleikan at arbeiða fulla tíð. Hetta fyri at skapa samanhang í gerandisdagin, so ikki ov nógv brot vera, og ov nógv ymisk starvsfólk eru um børnini. Eru ov nógv brot og skiftandi starvsfólk, skapar tað ótryggleika og mistrivnað hjá børnum og starvsfólki.

**Mælt verður til** at skapa karmar samsvarandi hesum riti, fyri at tryggja betri støðufesti fyri starvsfólk og fyri barnsins besta.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið og kommunurnar.

14

### Vegleiðing av nýútbúnum námsfrøðingum og hjálparfólkum

Vegna vantandi royndir kunnu nýútbúnir dagstovnanámsfrøðingar og nýggj hjálparfólk hava ilt við at fóta sær, tá ið tey koma í arbeiði á dagstovnum.

Eins og stór útskifting er av námsfrøðingum, er eisini stór útskifting av hjálparfólki. Neyðugt er við áhaldandi innanhýsis vegleiðing av hjálparfólkum, so tey støðugt verða før fyri at røkja uppgávurnar. Ein góð vegleiðing í arbeiðsuppgávurnar á dagstovnum kann í seinna enda eisini eggja hjálparfólkum at fáa sær útbúgving sum dagstovnanámsfrøðingar. Vegleiðaraarbeiðið skal roknast inn í tað námsfrøðiliga arbeiðið, sum liggur uttanfyri barnabólkin, so tíðin ikki verður tikin frá børnunum.

**Mælt verður til** at skipa fyri bæði styttri skeiðum og eini vegleiðaraútbúgving til dagstovnanámsfrøðingar, so teir fáa førleika og kunnleika at vegleiða bæði nýútbúnum námsfrøðingum og nýggjum hjálparfólkum.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið.

D

# Menningareind fyri dagstovnar

Dagstovnaøkið hevur ongan veruligan samskipara.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið metir seg ikki hava samskipandi leiklutin á dagstovnaøkinum, og ráðið hevur í sera lítlan mun avsett starvsfólkaorku til at arbeiða við økinum.

Kommunufelagið hevur somuleiðis sera avmarkaða orku til at arbeiða samskipandi á dagstovnaøkinum. Tískil er tað í stóran mun upp til kommunurnar sjálvar og einkultu stovnarnar at standa fyri menningar-arbeiðinum á økinum. Í roynd og veru merkir hetta, at økið dettur niðurfyri.

Ein menningareind kundi við fyrimuni verið skipað, sum hevði til uppgávu at samskipa menningina av dagstovnaøkinum. Menningareindin kundi skipað fyri ráðstevnum, evnisdøgum og førleikamenning á økinum. Menningareindin kundi eisini gjørt uppskot til felags mannagongdir og vegleiðingar, har tørvur var.

15

## Menningareind fyri dagstovnar í Føroyum

Tørvur er á at tryggja eitt høgt fakligt støði á øllum dagstovnum. Mælt verður til, at ein menningareind verður sett á stovn til at birta upp undir, kveikja og menna dagstovnanámsfrøðina. Eindin skal virka sum sambindingarliður millum kommunur, dagstovnar og Barna- og útbúgvingarmálaráðið. Eisini skal hon vera fastur samstarvspartur hjá politiska myndugleikanum á dagstovnaøkinum.

Bæði myndugleikar og starvsfólk skulu hava møguleika at venda sær til menningareindina.

Eindin skal:

- virka sum sambindingarliður millum kommunur, dagstovnar og Barna- og útbúgvingarmálaráðið
- veita kommununum og dagstovnum kring landið vegleiðing og ráðgeving
- styrkja og samskipa dagstovnaøkið og fáa til vega hagtøl og skipa fyri gransking og menning á økinum.

Eindin kann eisini skipa fyri ráðstevnum, evnisdøgum, og menna ymiskt tilfar til dagstovnaøkið.

Hetta kann verða skipað sum royndarvirksemi í fimm ár í fyrstu atløgu.

**Mælt verður til,** at ein menningareind fyri dagstovnaøkið verður stovnað skjótast til ber til tess at menna dagstovnaøkið.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið og kommunurnar.

# Keldulisti


Arbeiðseftirlitið: ARB-Vegleiðing, *Stødd av stovum á dagstovnum,* 2004. Tikið niður september 2022 á https://arb.fo/download/file/b99518130f2f11fcf7cb-0012dde5379e0f39fe86.pdf

Danmarks Evalueringsinstitut, (2017). *Kvalitet i dagtilbud Pointer fra forskning,* s. 4-5.

Engdahl, I. (2011) ; *Toodlers as social actors in the Swedish Preschoo*l. Stockholms Universitet. Stockholm.

Hagen, T. L., 2015: *Hvilken innvirkning har barnehagens fysiske utemiljø på barns lek og de ansattes pedagogiske praksis i uterommet.* Tikið niður í september 2022 á https://nordiskbarnehageforskning.no/index.php/nbf/article/view/117/118

Heckmann: *The Heckman Curve.* Tikið niður september 2022 á https://heckmanequation.org/resource/the-heckman-curve/

Heckmann et al, 2010: *The rate of return to the High Scope Perry Preschool Program.* Tikið niður september 2022 á https://heckmanequation.org/www/assets/2017/01/HeckmanMoonPintoSavelyevYavitz_RateofReturnPerryPreschool_2010.pdf
Føroya Løgting, 1999. Tikið niður september 2022 á https://www.logting.fo/mal/mal/?id=2029

Kommunufelagið: Ársfrágreiðing hjá Kommunufelagnum 2021. *The High/Scope Perry Preschool Study Through Age 40* http://www.kf.fo/arsa%C3%B0alfundur-2021

Løkken, G. (1996): *Når små barn møtes – om de yngste barnas gruppefellesskap i barnehagen.* Cappelen Damm akademisk. Oslo.

National Library of Medicine, 2002: *The relation of child care to cognitive and language development.* National Institute of Child Health and Human Development Early Child Care Research Network https://pubmed.ncbi.nlm.nih.gov/11016559/

NICHD, E. C. C. R. N. (2002). *"Early Child Care and Children's Development Prior to School Entry: Results from the NICHD Study of Early Child Care."* American Educational Research Journal 39(1): 133-164.

Schweinhart, L.J. et al, 2005: *The High/Scope Perry Preschool Study Through Age 40.* Tikið niður september 2022 á https://nieer.org/wp-content/uploads/2014/09/specialsummary_rev2011_02_2.pdf

Sheridan, S., et al. (2014). *"Group size and organisational conditions for children's learning in preschool: a teacher perspective."* Educational Research 56(4): 379-397.

Sommersel, H.B. et. al.: *Kvalitet i barnehager i skandinavisk forskning 2006-2011: En systematisk forskningskartlegging, 2013.* Tikið niður september 2022 á https://dpu.au.dk/fileadmin/edu/Udgivelser/Clearinghouse/Kunnskap_om_kvalitet_i_barnehager_01.pdf

Taggart, B., et al, 2015: *Effective pre-school, primary and secondary education project (EPPSE 3-16+)* Tikið niður september 2022 á https://dera.ioe.ac.uk/23344/1/RB455_Effective_pre-school_primary_and_secondary_education_project.pdf

Uttanríkis- og mentamálaráðið, 2016: *Námsfrøðilig stevnumið fyri dagstovnar.* Tikið niður 20. september 2022 á: https://www.ummr.fo/fo/arbeidsoki/utbugving-og-gransking/dagstovnar/namsfrodilig-stevnumid/

Williams, Sheridan, Samuelsson (2019): *A Perspective of Group Size on Children's Conditions for Wellbeing, Learning and Development in Preschool.* Í: Scandinavian Journal of Educational Research, 63(5):696–711.

# Fylgiskjal 1

## Endalønir hjá starvsfólkum á eldraøkinum og dagstovnaøkinum

### Samanbering av endalønum pr. 1. okt. 2017 og 1. okt. 2022

| Fakfelag | 2017 Løn 1. okt | 2017 Eftirløn 1. okt. | 2017 Løn í alt | 2022 Løn 1. okt | 2022 Eftirløn 1. okt. | 2022 Løn í alt | Munur í krónum | 2017-2022 Hækking í % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sjúkrarøktarfrøðingar | 34.307,39 | 5.146,11 | **39.453,50** | 36.702,38 | 5.505,36 | **42.207,74** | 2.754,24 | 6,98% |
| Námsfrøðingar | 30.880,89 | 3.705,71 | **34.586,60** | 35.126,48 | 4.215,18 | **39.341,66** | 4.755,06 | 13,75% |
| Fysio- og Ergoterapeutar | 30.641,32 | 4.841,33 | **35.482,65** | 35.326,38 | 5.298,96 | **40.625,34** | 5.142,69 | 14,49% |
| Heilsurøktarar | 26.792,10 | 4.233,15 | **31.025,25** | 30.464,87 | 4.813,45 | **35.278,32** | 4.253,07 | 13,71% |
| Heilsuhjálparar | 24.279,77 | 3.641,97 | **27.921,74** | 27.924,57 | 4.188,69 | **32.113,26** | 4.191,52 | 15,01% |
| Heimahjálparar | 22.763,41 | 3.414,51 | **26.177,92** | 25.828,12 | 3.874,22 | **29.702,34** | 3.524,42 | 13,46% |
| Námsfrøðiligur atstøðingur | 25.319,74 | 3.038,37 | **28.358,11** | 27.557,18 | 3.306,86 | **30.864,04** | 2.505,93 | 8,84% |
| Hjálparfólk á dagstovni | 23.809,91 | 2.857,19 | **26.667,10** | 25.948,36 | 3.113,80 | **29.062,16** | 2.395,06 | 8,98% |

### Samanbering av endalønum heilsuhjálparar og námsfr. atstøðingar 2017-2022 FAKLÆRD

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Heilsuhjálparar | 24.279,77 | 3.641,97 | **27.921,74** | 27.924,57 | 4.188,69 | **32.113,26** | 4.191,52 | 15,01% |
| Námsfrøðiligur atstøðingur | 25.319,74 | 3.038,37 | **28.358,11** | 27.557,18 | 3.306,86 | **30.864,04** | 2.505,93 | 8,84% |

### Samanbering av endalønum heimahjálparar og hjálparfólk á dagstovni 2017-2022 ÓFAKLÆRD

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Heimahjálparar | 22.763,41 | 3.414,51 | **26.177,92** | 25.828,12 | 3.874,22 | **29.702,34** | 3.524,42 | 13,46% |
| Hjálparfólk á dagstovni | 23.809,91 | 2.857,19 | **26.667,10** | 25.948,36 | 3.113,80 | **29.062,16** | 2.395,06 | 8,98% |

| Fakfelag | 01.mai.21 | Eftirløn | Løn í alt |
|---|---|---|---|
| Føroya Arbeiðarafelag | 24.964,72 | 2.746,12 | **27.710,84** |

Kelda: Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, oktober 2022.

# Fylgiskjal 2

## Mánaðarløn hjá sambæriligum yrkisbólkum við og uttan eftirløn

### Mánaðarløn uttan eftirløn, 1. september 2022




### Mánaðarløn við eftirløn, 1. september 2022




Kelda: Pedagogfelagið, september 2022

**DAGSTOVNARÁÐIÐ**